## DAGSINS MEINING

# Vinnureformur og løgmansvitjanir

Japanski sendiharrin í Danmark vitjar hesa vikuna í Føroyum, og hevur hann millum annað hitta løgmann, fiskimálaráðharran og umboð fyri vinnulívið. Ein slík vitjan hevur nógv at týða fyri Føroyar, ið er púra avhengugt av sambandinum við útheimin.

Í tí farna hava føroyingar ikki altíð verið so fullir í hugflog, tá tað kemur til sambandið við útheimin. Vit stara okkum mangan blind uppá Danmark, tá tað kemur til handilssambond og ikki minst infrastruktur, og harnæst hyggja vit at ES. Partur av hesum skyldast ein hugburð, har man undirbrotliga leggir seg skerflatan og gevur ríkisfelagsskapinum skyldina fyri egið vantandi hugflog, og vantandi initiativ til eitt nú dupultskattasáttmálar við, ideelt sæð, øll verðsins lond.

Tað er sjálvandi nærliggjandi at hyggja at ES, eftirsum tað er tann stóri marknaðurin, ið liggur næst okkum. Tó tykist tað, sum vit hava lagt ov nógv av okkara eggum í eina kurv. Tað gevur at bíta, tá til dømis protektionistisku ES reglarnar fyri dumping verða nýttar ímóti okkum. Ein ES framleiðari kann uttan nakran kostnað ella avleiðing, seta fram dumpingákærur móti útlendskum framleiðarum, ið fáa ein meirkostnað, óansæð útfallið av hesum ákærum. Hesar reglar, kombineraðar við einari føroyskari alivinnu á knøum, fingu fólk í føroyskari vinnu og í føroyskum politikki í ramasta álvara at skjóta upp, at Føroya Landsstýri skuldi svíkja øll prinsipp og argumentera fyri ES importkvotum. Hetta er eitt gott dømi um, hvussu desperat vit verða, um ES marknaðurin knappliga ikki er til vildar.

Tí er altumráðandi at spreiða okkum út yvir fleiri marknaðir og ikki bara loypa har garðurin í verandi stund tykist lægstur.

Føroyingar útflyta longu nú fitt av sílum til Japan, og hava vit ígjøgnum nógv ár havt samband við japanesarar. Fyri meir enn 20 árum siðani vóru stórar føroyskar delegatiónir í Japan. Hesir túrar vóru m.a. fyriskipaðir av Tórmóði Dahl sála, og fekk millum annað føroysk skelja- og rækjuvinna fitt av íblástri harifrá. Nýggir tankar er ikki júst ein yvirskotsvøra í føroyskari fiskivinnu, har reiðarar við ókeypis almennum frammihjárættindum, uttan atlit til somu skattgjaldarar, ið lata hesi frammihjárættindi, vilja sleppa at verða púra fríttstillaðir í søluliðnum, meðan teir berjast við hond og fót móti fríari kapping, tá tað kemur til at sleppa framat. Nýggir vindar mugu blæsa yvir føroyska vinnu, og er tað her, at tað almenna eigur at hjálpa við at knýta bond so vítt sum møguligt.

Løgmaður eigur at verða nýttur, sum ministarar aðrastaðni, og eigur at leiða eina vinnudelegation til Japans og seinni onnur lond, við tí endamáli at knýta handilssambond, ið minka um avhengigheitina á einstakar marknaðir, og at útvega føroyingum know-how innan fiskivinnu og sjálvandi eisini aðra vinnu. Eitt slíkt tiltak eigur at knýtast saman við einum vinnureformi í Føroyum, soleiðis at kapping verður um alla rávøruatgongd, tí ikki nyttar at hava høvdið fult av góðum hugskotum úr Japan og aðrastaðni, um man hevur eina kongsbóndaskipan á sjónum, har veiðurættindi vera latin nøkrum fáum, ið so kunnu hava tey óavmarkað uttan kapping frá ungum dugnaligum kreftum. Og latið okkum so eisini ansa eftir, at vit ikki detta í somu grøv, tá vit vónandi fara í gongd við eina oljuvinnu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lærarskúlin ein handilsskúli?

**Kári Leivsson**

Mær kunnugt eigur Føroya Lærarskúli at vera oddafiskur í málvernd og hava eina yvirorðnaða yrkisliga ábyrgd fyri móðurmálsfrálæruni í landinum. Vit eiga tí at kunna vænta av hesum stovni, at hann vandar sær serstakliga um sína málnýtslu og stuðlar bæði málfrøðiliga og orðafatanar samleika barnanna.

Ein sera marghátttlig lýsing var frá hesum stovni í Sosialinum leygardagin 9. oktober.

Móðurmálslærarar skúlans áttu at tikið hesa lýsing, hennara orðaval og setningsbygging sum skyldunámsevni. Ikki skal eg gjøgnumganga lýsingina - tað kunnu tit sjálvir gera, men bert nevna greflig dømi.

Har er lýst við undirvísing í hvussu "pedagogur fatar og handlar...."

Eisini um "hvørja meining børnini leggja í handlingarnar"

Sig mær - skulu børnini læra at fara til handils ella hvat? Sjálvur veit eg ikki hvørja "meining eg skal leggja í handlingar", so kanska átti eg sjálvur vaksin at farið aftúr í barnagarð.

"Álvaratos - um lærarskúlin skal halda ráðstevnu um danska uppalingarmentan, við donskum pedagogmáli, hví so ikki heldur skriva danskt, enn at skapa eitt hálvbrotið yrkismál beinleiðis yvirflutt, bæði viðvíkjandi orðavali og setningabygging?"

Og hví ikki nevna skeiðið "uppalingarmentan í Danmark" heldur enn bert at vænta at vit skulu svølgja alt rátt, sum algilda frøði?

# Lógin forðar fyri skilagóðum bústaðarloysnum

TÍÐINDASKRIV
*frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag*

Á almennum fundi um bústaðarviðurskiftini í Tórshavnar kommunu, sum Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag skipaði fyri á Landsbókasavninum 15. september í ár, kom fram, at ein av stóru trupulleikunum í sambandi við íbúðarbygging og -útleigan er lóggávan á økinum.

**Ójavnar treytir**
Millum annað kom fram, at mvg-lóggávan og reglurnar um rentustuðul til sethúsalán eru orsøk til at tað loysir seg nógv betur fíggjarliga at byggja sethús heldur enn at fremja aðrar íbúðarloysnir. Grundin til hetta er, at rentustuðul og mvg-frítøka bara verður veitt einstøkum privatum húsaeigarum, meðan privat feløg ella sjálvsognarstovnar ikki hava møguleika at fáa hesar sømdir. Úrslitið er tað marghattliga, at hóast tað at byggja nógvar íbúðir í senn og saman í allar aðrar mátar er bíligari enn at byggja eitt og eitt sethús, so er sethúsaloysnin nógv bíligari, tí hon nýtir gott av rentustuðli og mvg-frítøku.

Semja var um á fundinum hjá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag, at hesin ójavni í møguleikunum hjá ávíkavist einstaklingum og feløgum ikki er rímuligur. Treytirnar fyri íbúðarbygging eiga at vera tær somu, uttan mun til, um byggiharrin er ein einstaklingur ella ein felagsskapur. Fundurin tók ikki støðu til, hvørt feløg o.tl. skulu fáa rentustuðul og mvg-frítøku, ella um einstaklingar skulu missa hesar framíhjárættir, men semja var um, at treytirnar eiga at vera tær somu fyri øll.

**Vinnulig útleigan**
Eitt annað, sum var frammi á fundinum, var møguleikin hjá fólki at leiga út á vinnuligum grundarlagi. Sum er hava fólk ikki møguleika til at leiga eitt nú kjallaran út, og so at rokna hesa útleigan sum vinnuveg. Reglurnar í dag eru soleiðis, at eini hús mugu hava minst 10 leiguíbúðir, áðrenn eigarin fær somu sømdir viðvíkjandi skatti og avskrivingum sum allar aðrar vinnur fáa. Um hetta var broytt, soleiðis at einhvør útleigan varð roknað sum vinnulig, har útleigarin hevur roknskaparskyldu og fær rætt at avskriva bygningin, hevði tað merkt betri lønsemi fyri útleigaran og sum fylgja av tí lægri leiguprísir. Haraftrurat ber til at hugsa sær, at tað í nógv minni mun enn í dag fór at loysa seg at lata vera við at geva leiguinntøkur upp í skatt. Eisini varð umrátt á fundinum, at tað átti at borið til hjá eldri fólkum at leiga út partar av husum teirra skattafrítt.

**Leigulógin má dagførast**
Eitt triðja sum fundurin legði stóran dent á, var tørvurin á eini dagførdari og herdari lóggávu á leiguøkinum. Sum er inniheldur leigulógin ongar bindandi ásetingar, sum kunnu nýtast til at tryggja eitt nú ein ávísan standard á íbúðum, sum vera leigaðar út. Hetta eigur at vera broytt soleiðis, at leigulógin verður ein brúkaraverja, sum setir nøkur minstukrøv til tað sum verður leigað út og sum ásetir treytir fyri eitt nú uppsøgn av leigumáli og ásetan av leiguprísi.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Álit og førleiki

**Jógvan Arge**
*valevni tjóðveldisfloksins til býráðsvalið*



VAL04

Vit vita tað øll, at Tórshavnar Kommuna er ikki nóg væl fyri umsitingarliga og politiskt. Nógv merkja tað eisini á sínum egna kroppi, og tí er so lítið álit á kommununa.

Hon er í heilum í andglettinum fyri skeiva og óvinarliga framferð mótvegis borgarunum. Vantandi førleiki er rótin til tær hvøssu atfinningarnar og hørðu átalurnar, sum kommunan hevur fingið seinastu árini.

Tað sker í eyguni, at kommunan til dømis bert hevur ein løgfrøðing, sum er settur í ein krók at varða av skattamálum. Onki starvsfólk við løgfrøðiligum førleika er uppi í dagligu málsviðgerðini, har lóggávan leggur stóran dent á opinleika, sakligheit og javnsetta viðferð av borgarum.

Hevur Tórshavnar Kommuna brúk fyri løgfrøðiligari ráðgeving, heldur hon tað vera nóg mikið at fara í býin til ein businessadvokat at leita sær ráð. Hetta kann vera gott í summum førum, men bøtir ikki um hugburðin og førleikan innanveggja hjá kommununi.

Ein máti at byggja upp aftur álitið millum kommununa og borgarnar er at styrkja býarins politisku leiðslu og leggja dent á at menna førleikan í sjálvari umsitingini. Tann ófullfíggjaða samansetingin í dag er óivað ein grund til, at opinleiki og gjøgnumskygni vanta í kommununi.

Tað skelkaði meg djúpt fyrst í valskeiðnum, at sjálvt skráin fyri býráðsfundirnar ikki varð almannakunngjørd. Tær viðgerðirnar, sum skuldu vera almennar, vórðu tagdar burtur.

Tað hevur eydnast okkum í andstøðuni at bøta eitt sindur um hetta, men tað vanliga er framvegis, at mál koma ikki út til almenningin, fyrrenn tey eru avgreidd. Sostatt er samskiftið við borgarnar sera avmarkað.

Kommunan er ein tænastumiðstøð fyri borgarnar. Hjá býráðnum ræður um at tæna fólkinum eftir teimum reglum, sum eru settar upp fyri hesum tænastuvirksemi, eitt nú í lógunum um fyrisiting og alment innlit.

Býráðið og kommunan umsita borgarans virðir, og tað er umráðandi, at borgarin hevur álit á, at tey verða umsitin væl.

Her má broyting koma í, og tú kanst verða við til at fremja broytingina 9. november.

# Á tann deiliga Havn – Tórshavnar Havn??

**Tummas í Garði**
*Býráðsvalevni fyri Fólkaflokkin*



VAL04

Nógv rumbul hevur staðist av útbyggingunum á ytra havnaøkinum seinastu tíðina.

Flest øll eru stolt av nýggju Norrønu, men ymiskar meiningar eru um hvar, og um hon skal hava fast atløgupláss í Havn. Somuleiðis farmaruturnar. Her er talan um at viga ímillum reint fíggjarlig- og reint umhvørvislig- ella trivnaðarlig atlit.

Ímeðan nógv rok hevur verið um hvussu ytra havnaøki skal nýtast, hevur eingin tikið upp á tungu teir møguleikar sum eru á innasta havnaøkinum.

Tað er eitt sindur hugvekjandi, tí innaru økini eru annars tey ið vit borgarar brúka dagliga, ímeðan ytra havnalagið er stongt fyri ørindaleys!

Eg vil royna at fáa fokus uppá eitt av innaru økjunum: Vestaru Vág - Undir Bakka -Vágsbotn, fram við Skálatrø og undir Múllers Pakkhúsið.

Hesi øki eru uppløgd rekreativ øki, sum havnarborgarar, handilsvinnan og gestir kunnu fáa enn meira gleði burturúr.

Býráðssamgongan hevur í seinasta skeiði brúkt orku og pening at fáa kloakkina leidda burtur úr Vágsbotni, og ætlar at halda fram heilt út undir Múllers Pakkhús.

Stóra tøkk og rós fyri tað: Vágsbotnur er longu nú vorðin nógv reinari.

Nú Kommunan, meira ella minni frívilja hevur yvirtikið sluppina Westward Ho, og hartil stásiliga setta í stand, er tað ein fínur møguleiki at fáa økið úr Vágsbotni út undir Bakka til eina sanna perlu við havnafrontin:

Arbeitt eigur at vera fyri at seglriggaðu skipini Norðlýsið og Westward Ho kunnu fáa føst briggjupláss her saman við Thorshavn. Hetta hevði skapa eitt sera gott umhvørvi úti undir Bryggjubakka til gleði fyri smábátaeigararnar, matstovur, evt tónleikalív og alt handilslívið í miðbýnum annars. Øki út undir Mùllers Pakkhús eigur eisini at verða betra, so Pakkhúsið kann koma enn meira til brúks, bryggjuplássini verða betur, og alt økið gerst enn meira áhugavert fyri bæði bátaeigararnar, mentunargestir og handilsviðskiftafólk.

Tá kunnu vit øll av hjarta taka enn meira undir við skaldinum: Á tann deiliga Havn – eisini tá talan er um Tórshavnar Havn!!

# Svimjimøguleikarnir skulu víðkast

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur fyri Javnaðarflokkin*
*www.lindenskov.com*



VAL04

Fyri trimum árum síðani legði eg uppskot fyri býráðið um at víðka um svimjimøguleikarnar í Tórshavnar kommunu. Tørvurin er stórur, og trýstið á verandi svimjihyl er meira enn gott er.

Svimjing er einasta ítróttartilboð, sum allir borgarar í kommununi kunna njóta uttan mun til aldur ella førleika. Svimjihøllin er einasta ítróttartilboð, sum ikki krevur limaskap í felag, ella krevur at ein møtir til ásettar tíðir. Eitt sera gott og heilsumennandi tilboð, til hvønn tann einasta borgara í kommununi. Tá um fólkaheilsuna ræður, er svimjing eitt tað besta tilboðið, sum kann bjóðast fólki.

Svimjihøllin er nú 22 ára gomul. Høllin avloysti Svimjihylin í Gundadali, sum tá var 23 ára gamal. Tann hylurin var úti og kundi tí bert brúkast summarhálvuna. Svimjihøllin var tá eitt stórt framstig.

Fyri 22 árum síðani búðu umleið 13.000 fólk í Kommununi. Í dag eru vit upp ímóti 20.000 fólk í Kommununi eini 7000 fleiri enn tá íð høllin bleiv bygd.

Talið á vitjandi liggur um 450-500 um dagin. Talið er munandi størri um summarið, tá ið høllin er opin allan dagin. Um summarið vitja millum 650 og 800 fólk svimjihøllina um dagin. So stórt er trýstið á svimjihøllina.

Seinastu árini hevur kommunan víðkað um onnur ítróttartilboð. Tórsvøllur er bygdur, Ítróttarhøllin í Hoyvík er bygd, Ítróttarhøllin í Kollafyri er komin væl áleiðis. Hetta eru øll góð tiltøk, sum hava verið røtt at gera, men nú er tíðin komin til svimjingina.

Eg fari tí at endurtaka mítt uppskot um, at næsta stigi fyri ítróttina verður at víðka um svimjimøguleikarnar, soleiðis at bæði almenningurin, skúlar/barnagarðar og svimjifeløgini fáa góðar umstøður at svimja í. Eg skjóti upp, at vit á 25 ára degnum hjá svimjihøllini í 2007, í minsta lagi eru komin væl áleiðis, tá umræður at útbyggja svimjimøguleikarnar í kommununi.

Fert tú inn á mína heimasíðu, sær tú, at eg eri ótroyttilig, tá ið tað snýr seg um at berjast fyri mínum hjartamálum. Leitar tú eftir barnaansing, finnur tú ikki færri enn 72 greinar. Hetta mál er nú um at verða loyst. Eg vóni ikki, tað verður neyðugt at skriva so nógvar greinar fyri at fáa bøtt um svimjimøguleikarnar. Men verður tað neyðugt, so geri eg tað.

# Kvøldskúlarnir

**Maud Wang Hansen**
*Námsfrøðingur*



VAL04

*Gíslatøka, rættar ikki uppá okkara plasering á ST-listanum, har vit frammanundan eru samanborin við Uganda og Kenya, tá tað snýr seg um samfelagsviður-skiftini hjá fólki ið bera brek.*

Nú er tjakið um kvøldskúlavirksemi fyri menningartarnað ella um serundirvísingina hjá Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúla blivið eitt heitt evni.

Eg havi hildið mær og býða til onkur annar fór at gera vart við seg og sína hugsan um hetta málið.

Eftir at hava ásannað, at fólk í bera brek bert eru landsborgarar og ikki kommunalborgarar, siti eg eftur við einum beiskum smakki í munninum.

Vit siga at Tórshavnar kommuna er fyri allar borgarar ið her búgva, men vit síggja at tað er ikki so. Munur verur gjørdur á um tú ert fullførur ella ikki.

Hesin bólkur av fólki, sum dagliga passar seg sjálvan og ikki er til ampa fyri nakran í okkara samfelag, kanska tvørturímóti, sum er við til at vaksa um menniskjansligu virðini í nærumhvørvinum har tey búgva, arbeiða og ferðast til dagligt, skal nú aftur óskiljandi vera vitni til at pláss ikki er fyri teimum.

Hvørt serundirvísing er ein landsuppgáva ella kommunaluppgáva, munnu tey fáu gáa um. Við einum pennastrokið er alt kvøld- og ungdómsskúlavirksemi tikið frá teimum.

Hví gera tey ikki vart við seg, tey sum eru rakt?

Tí tey tora ikki, tey eru ikki von við at brúka miðlarnar til at vísa á skeivleikar í teirra dagligdegi, tey liva bara við teimum eins og tey liva við sínum brekum uttan at rópa upp.

Tey vera ikki vird sum aðrir borgarar í Tórshavnar kommunu og tí vita tey ikki hvønn tey skulu fara til.

Hvørja ferð námsfrøðingar standa framm fyri tey menningartarnaðu fyri at kæra teirra neyð, hoyra vit, at tey hava so nógv at ganga til og tey ferðast altíð og tey síggja altíð glað út.

Hetta eru tómir flosklar og er bert eitt úttrykk fyri manglandi innlit í dagligdagin hjá teimum sum bera brek.

Hevur nakar miðli sett seg í samband við tey sum eru rakt av hesum skeringum? Mær vitandi, nei!

Á temadegi í Norðurlandahúsinum var haft frammi, at vit gera órætt tá vit tosa um tey "veiku" í samfelagnum. Og tað er púra satt, fólk ið bera brek eru ikki veik í sær sjálvum, men tey vera gjørd veik tá møguleikarnir fyri at vera virkin vera tiknir frá teimum. Í hesum førum møguleikarnir til at hava eina lærurika, mennandi og jaliga samveru við líkastillaðum á kvøldskúlanum.

Ein keta er ongantíð sterkari enn tað veikasta liðið. Og ein skipan sum tekur menningartarnaði og onnur sum bera brek gíslar í einum politiskum peningastríði, er ein veik skipan.